

# Samkomublaðið fyri mai

# 2017

KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar







www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið

## Størsta gávan



Jóna S.F. Jacobsen

**Jóh.14,1-6:**
v1 «Hjarta tykkara verði ikki óttafult! Trúgvið á Guð, og trúgvið á meg! v2 Í faðirs míns
húsi eru mangir bústaðir. Var tað ikki so, hevði eg sagt tykkum tað; tí at eg fari burtur at
tilbúgva stað fyri tykkum. v3 Og tá ið eg eri farin burtur og havi tilbúgvið stað fyri
tykkum, komi eg aftur og skal taka tykkum til mín, til tess at har sum eg eri, skulu tit
eisini vera. v4 Og hvar eg fari, hagar vita tit vegin.» v5 Tummas sigur við hann:
«Harri, vit vita ikki, hvar tú fert; hvussu skulu vit tá vita vegin?»
v6 Jesus sigur við hann:
«Eg eri vegurin og sannleikin og lívið. Eingin kemur til faðirin uttan við mær.

Jesus sigur okkum greitt, at uttan Hann eru vit ikki á vegnum, sum førir heim í tann bústað, sum Hann ger til reiðar. Tí mugu vit venda um og verða fødd av nýggjum (Jóh. 3, 3).

At eiga frelsuna í Jesu fullgjørda verki á Golgata, er størsta gávan, ein kann uppliva og at ognast teimum lyftum, sum Guð hevur givið okkum í sínum Orði, at vit í øllum førum kunnu koma til Hansara og at uppliva, at Hann er tann, sum Orðið sigur. Tað er so stórt. Tað kann ikki forklárast, men má upplivast.

**1. Jóh. br. 5, 10-12:**
Tann, sum trýr á Guðs son, hevur vitnisburðin í sær sjálvum; tann, sum ikki trýr Guði, hevur gjørt hann til lygnara, tí at hann ikki hevur trúð á tann vitnisburð, sum Guð hevur vitnað um son sín. Og hetta er vitnisburðurin, at Guð hevur givið okkum ævigt lív, og hetta lívið er í syni hansara. Tann, sum hevur sonin, hevur lívið; tann, sum ikki hevur Guðs son, hevur ikki lívið.

Jesus Kristus er í gjár og í dag hin sami og um allar ævir. (Hebr. 13.8).

Takk, o Guð, at tú frelsti meg, takk, at eyga títt bar við meg, takk, at Harran Jesus tú gav, takk fyri náðinnar djúpa hav.

# Skrá fyri mai

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 1. mai | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 2. mai | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur | 4. mai | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 6. mai | kl. 20.00: | AWAKE bønarmøti |
| Sunnudagur | 7. Mai | kl. 11.00: | Sjónvarpsmøti við Ingibjørn Royðutoft o.fl.<br>Innsavnan av tíggjund av heiløgum gávum<br>Sangframførsla við Maibritt H. Johansen |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 8. mai | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 9. mai | kl. 10.00: | bønardagur |
| Leygardagur | 13. mai | kl. 20.00 | AWAKE við Súsonnu Olsen og Bodil Olsen |
| Sunnudagur | 14. mai | kl. 11.00: | Morgunmøti við ymiskum kvinnum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 15. mai | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 16. mai | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur | 18. mai | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 20. mai | kl. 20.00: | AWAKE við Anniku Høj. Evni: Dare to be different! |
| Sunnudagur | 21. mai | kl. 11.00 | Morgunmøti við Paula Høj.<br>Ungdómssigning (sí Lýsingar)<br>Sangframførsla við Jansy Frederiksberg |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 22. mai | kl. 19.00: | Reach out í Lamba |
| Týsdagur | 23. mai | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 27. mai | kl. 20.00: | AWAKE við Paula Høj. Evni: Visiónin livir enn! |
| Sunnudagur | 28 mai | kl. 11.00: | Morgunmøti við Ólavi og Liljan Jacobsen.<br>Breyðbróting. Sangframførsla við Signu Andersen |
| | | kl. 18.00: | Møti. |

| | |
|---|---|
| Mánadagur 29. mai kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur 30 mai kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur 1. juni kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur 3. juni kl. 20.00: | Einki AWAKE vegna samkomulegu |
| Sunnudagur 4 juni kl. 11.00: | Morgunmøti við luttakarum frá samkomuleguni<br>Innsavnan av tíggjund av heiløgum |

# Lýsingar

**Samkomulegan**
Eins og undanfarna ár, verður aftur skipað fyri góðu og stuttligu samkomuleguni á hvitusunnu.
Hettar er legan fyri okkum øll! Gift, støk ung og eldri – øll kunnu kenna seg heima, og vóna vit, at undirtøkan verður góð
Ynski og endamálið við leguni er, at vit koma nærri Gudi og nærri hvør øðrum, og verður høvi at hugna sær, flenna saman og fáa góða andaliga føði.
Men legan verður ikki tann sama uttan teg – ja, vit meina júst teg! So góða/góði tú, ver við og hjálp okkum at fáa eitt ógloymandi vikuskifti saman!
Nærri kunning og tilmelding kemur heilt skjótt – men set longu nú kross í kalendaran vikuskiftið
2. – 4. juni.

**Ungdómssigning 21. mai**
Sunnudagin 21. mai verður ein søguligur dagur í Kelduni, har vit fara at hava okkara fyrstu ungdómssigning av ungum í 7. flokki. Tey hava fingið undirvísing ígjøgnum hetta skúlaárið, sum fyrireikar tey uppá lívið sum vaksin.
Aftaná møtið verður møguleiki at keypa sær døgurða, har oksafilet við rómaeplum o.ø. er á skránni. Til ber at tilmelda seg við at smsa til Margit Høj á tlf. 284322 innan 17. mai. Kostnaður fyri heilan døgurða er 75 kr. og fyri hálvan døgurða er kostnaðurin 50 kr.

**Rend Collective**
Ágrýtni og nýskapandi bólkurin, Rend Collective úr Írlandi, kemur nú til Føroya í juni. Bólkurin hevur konsert í Kelduni 8. juni kl.20. Les meira um konsertina á keldan.fo.

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584